


– Hendan ætlanin er neyðug fyri Føroyar fyri at fáa familjur at støðast og at økja um lívskvalitetin, sigur Jákup á Dul

Mnd: Jens Kristian Vang

# Stóratjørn - skal fáa føroyingar

**Fyrrapartin varð nýggja byggiætlanin hjá Jákupi á Dul Jacobsen avdúkað. Ætlanin er at byggja hotell, íbúðarblokkar og alskyns ítróttarøki í Hoyvíkshaganum. – Talan er ikki um kapping millum Havnina, Runavík og Klaksvík, men heldur millum Føroyar, Ísland og Noreg, sigur Jákup á Dul Jacobsen**

NÝMÓTANS NIÐURSETUBYGD
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Eindømi í føroyskari byggisøgu. Stutt og greitt.

Tað var ein av orðingunum sum stóð í tíðindaskrivinum, ið tey sum vóru komin niðan á Hotel Føroyar í Havn fingu stungið í hondina, meðan tey bíðaðu eftir, at ígongdsetarin Jákup á Dul Jacobsen byrjaði at greiða frá sínum ætlanum í Hoyvíkshaganum. Og tað eru ikki hissini hugskot, hann hevur fingið Tórshavnar býráð at játta byggilendi til.

Tilsamans hevur P/f Jákup á Dul søkt um eitt øki, ið tilsamans er 300.000 fermetrar til víddar, og tað skal eita Stóratjørn. Økið liggur beint við ta nýggju innkoyringina til Havnina, miðskeiðis millum býarpartarnar Inni á Gøtu og Hoyvíkshagan Suður.

Lyklaorðini eru handil, vinna og framtíð. Byrjað varð við at vísa ein film um sjálva verkætlanina Stóratjørn, har vit fylgdu tí sama snøgga parinum ganga gjøgnum alt økið, har tey royndu baðilandið, fótbóltshøllina, skoytuhøllina, heilsumiðstøðina, hotellið, ráðstevnu- og skrivstovuhølini, íbúðina og ikki minst golfvøllin.

Jákup á Dul Jacobsen legði fyri við at siga, at hann metti hetta vera neyðugt fyri Føroyar, tí um vit ynskja at bjóða fólki somu lívsgóðsku sum í øðrum londum, so skal familjan hava góðar umstøður at hugna sær saman eftir arbeiðstíð. Familjan var nevniliga eitt hugtak, ið gekk nógv aftur í framløguni hjá Jákupi á Dul Jacobsen, sum legði dent á, at talan ikki er um eina kapping millum Klaksvík, Runavík og Havnina, men heldur millum Føroyar, Ísland, Noreg og Ongland.

Jákup á Dul Jacobsen vísti nevniliga á, at mett verður at eini 20.000 føroyingar arbeiða uttanlands. Hetta eru fólk, sum Føroyar hava uppfostrað, men sum nú vinna pening til onnur lond. Hetta segði hann seg vilja broyta, og nevndi Ísland sum dømi, har fíggjarvinnan hevur avloyst fiskivinnuna sum størsta vinna. Her er talan um ein bransju, har tað kann gera tað sama, hvar ein er, bara teldusambandið er gott. Ætlanin er sostatt sambært Jákup á Dul Jacobsen at fáa bæði vinnulívið og familjuna at blóma.

Ella sum hann sjálvur segði:

- Fólk, ið eru í form, geva størri avkast.

### Nýggjar ítróttargreinir

Stórur dentur er nevniliga lagdur á góðar umstøður og hentleikar til ítróttin. Jákup á Dul Jacobsen nevndi, at gamli svimjihylurin í Gundadali var opin í 23 ár, eins 23 ár eru liðin, síðani núverandi svimjihøll við 25 metrar longum hyli læt upp. Tí helt hann tíðina vera komna at fáa ein 50 metrar langan svimjihyl, tí tann longdin er kravd í altjóða kappingum.

Harafturat eru bæði baðiland og skoytuhøll við í ætlanini. Viðmerkjast kann, at í nýggja álitinum, sum er handað Tórshavnar býráð um børn og ung, eru hesi viðmæld.

Umframt FIFA-góðkenda fótbóltshøll við plássi til 3000 áskoðarar, verður eisini golfvøllur við 9 holum, sum Jákup á Dul Jacobsen metti vera neyðugt fyri ferðavinnuna í Føroyum.



*Venjingar- og heilsumiðstøð verður millum skoytuhøll, baðiland og fótbóltshøll. Hendan verður umleið 2000 fermetrar stór.*



*Sjálvur kjarnin í ætlnanini hjá Jákup á Dul Jacobsen er handilsdepilin, sum verður 25.000 fermetrar til víddar*



*Háhús eru ein óvanlig sjón í føroyska landslagnum. Pláss verður fyri 300 húskjum í nýggja býlinginum, Stóratjørn*